Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Høgni Hoydal, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Nevndarbroytingar í BankNordik

Spurningar:

1. Kann løgmaður upplýsa, hvør hevur tikið stig til ætlanina at skifta allar nevndarlimirnar í BankNordik út, og hvør grundgevingin hjá stigtakarunum er fyri at skifta alla nevndina út í einum ?

2. Hvør er grundgevingin fyri, at løgmaður hevur tikið undir við ætlanini at skifta alla nevndina í BankNordik út ?

3. Kann løgmaður upplýsa, hvør strategiin og eigarapolitikkurin hjá landsstýrinum er sum størsti partaeigari í BankNordik?

4. Tekur løgmaður undir við, at BankNordik rindar stór vinningsbýti til partaeigararnar, sum í stóran mun fara av landinum?

Viðmerkingar:

Um vikuskiftið frættist í Útvarpinum, at øll nevndin í BankNordik skal skiftast út á aðalfundinum í næstum. Áður varð alment boðað frá, at tveir nýggir nevndarlimir skulu veljast.

Upplýst varð eisini, at landsstýrið sum størsti partaeigari hevur tikið undir við hesi knappligu broyting og almennu fráboðan, og at tað er løgmaður, ið hevur tikið avgerðirnar vegna landsstýrið.

Tað er sera óvanligt, at ein heil nevnd verður skift út við so knappari fráboðan og enntá í einum so týðandi stovni sum landsins størsta banka, og at ein almenn fráboðan verður broytt við so stuttum skotbrái.

Tí verður løgmaður biðin um at greiða tinginum frá, hvørjar orsakirnar eru til hetta, og hvørjar ætlanir og hvønn eigarapolitikk landsstýrið hevur sum størsti partaeigari í BankNordik.

Á Løgtingi, 8. mars 2022

Høgni Hoydal